# Julian skal standa síðstu royndina í dag

**Eftir at hann við B36 hevði vunnið hálvfinaluna, skal hann við Akranesi, har alt hevur andað av fótbólti í hesi vikuni, spæla endadyst í steypakappingini**

ÚTISETI Í ÍSLANDI
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Julian hevur verið mettur sum ein av bestu leikarunum hjá ÍA í kappingarárinum, og einki er at ivast í, at hann verður millum teir fyrstu ellivu á Laugardalsvøllinum*

Julian Johnsson hevur havt eitt fínt kappingarár. Undan summarsteðginum var hann við til at spæla B36 í finaluna um Løgmanssteypið. Undan Ólavsøkuni og steypafinaluni ímóti GÍ flutti hann til Akranesar. Tá ið Julian kom til ÍA var fótbóltslagið einki serligt. ÍA var millum lægst staddu feløgini, og tað varð lítið hugsað um heiðursmerki í landskappingini og møguleikan at vinna steypafinaluna. Síðani er alt vent á høvdið. Síðsta sunnudag vann ÍA bronsukrónurnar í landskappingini, og í dag klokkan eitt føroyska tíð hava verður steypafinalan, har teir í ÍA hava møguleika at vinna steypafinaluna. Tá skulu teir spæla á Laugardalsvøllinum ímóti FH av Hafnafirði.

– Vit hava ikki tapt í tíggju teimum seinastu dystunum. Vit hava vunnið níggju ferðir, og eina ferð hevur verið javnt. Fólkið her á plássinum fylgir ógvuliga væl við fótbóltsliðnum, og tað fer maður av húsi til Reykjavíkar at fylgja við í finaluni. ÍA hevur fleiri ferðir verið í finaluni, so tey vita, hvat tað snýr seg um, sigur Julian Johnsson av Akranesi.

Seinnapartin í gjár klokkan hálvgum trý skuldu Julian og liðfelagarnir venja fyri síðstu ferð undan finaluni. Síðani var ætlanin, at teir skuldu fara undir Hvalfjørðin og til Reykjavíkar, har teir í gjárkvøldið og í morgun á gistingarhúsi skuldu leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til steypafinaluna.

Væntar tú, at tit fara at vinna?

– Tað verður rættuliga tætt. FH hevur staðið seg ógvuliga væl. Tað vóru teir, sum á síðsta leikdegi í landskappingini tóku silvurmerkini fyri nøsini á okkum. Men gongdin nógvu tær seinastu vikurnar hevur havt við sær, at sjálvsálitið verður í lagi, tá ið vit fara inn á Laugardalsvøllin.

Í fyrradagin varð Julian Johnsson í dagblaðnum DV saman við tveimum verjuspælarum mettur at hava verið besti spælarin hjá ÍA í hesum kappingarárinum. Tí kemur tað ikki óvæntað, at Julian Johnsson verður ímillum teir fyrstu ellivu á Laugardalsvøllinum í dag.

– Eg havi fingið at vita, at eg skal hava framrættaðan leiklut á miðvøllinum. Eg skal taka mær av verjukendum miðvallara hjá teimum, og so verður tað vónandi soleiðis, at onkur møguleiki verður at skjóta ímóti málinum ella kanska at royna við høvdinum, heldur Julian Johnsson.

Í gjár fóru foreldrini hjá Juliani, Janne og Kristinn Johnsson, vikuskiftisferð til Íslands. Í dag vera tey millum áskoðararnar á Laugardalsvøllinum. Mánadagin koma tey aftur til Føroya saman við soninum, sum føroyingar vóna verður steypavinnari, nú hann fram til eftir ársskiftið fer at halda frí frá fótbóltinum.

Fyrra liðið, sum Julian var við til at spæla í finaluna, B36, vann endadystin. Nú er tað upp til ÍA og Julian Johnsson at endurtaka bragdið.

# Seinasta umfarið kanska leygardag

**Eftir skránni endar kappingin í fyrstu deild annan sunnudag, men nú verður kannað, hvørt tað er møguligt at flyta hetta til leygardag**

KAPPINGARLOK
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið mest sum fastur siður seinnu árini, at kappingin í bestu fótbóltsdeildini her heima endar ein leygardag. Ein siður, sum ivaleyst man vera komin væl við hjá nógvum, tí tað er helst ikki altíð so lætt at skula tíðliga til arbeiðis dagin eftir, at eitt langt kappingarár er runnið.

Orsøkin til, at seinasti leikdagurin so oftani hevur verið leygardag, hevur tó í flestum førum verið skráin hjá fótbóltslandsliðnum. Aloftast hevur tað nevnliga verið so, at landsliðið hevur átt ein dyst eftir, tá komið er út í oktober mánað, og fyri at geva landsliðsvenjaranum ein dag eyka at savna menn sínar, hevur leygardagurin verið nýttur.

Í ár er tó eitt sindur øðrvísi. Landsliðið endaði sína undankapping við tapinum fyri Litava á Svangaskarði, og tí kann hendan grundgevingin so ikki nýtast fyri at framskundað seinasta leikumfarið.

Skráin er eisini løgd soleiðis, at endað verður ein sunnudag, men fleiri feløg hava tó givið til kennar, at tey heldur enn fegin sóu hetta broytt. Tosað hevur verið aftur og fram um hetta, og nú er so eisini líkt til, at Fótbóltssambandið er farið í holt við kanna, hvørt hetta er gjørligt.

Trupulleikin í hesum er tó, at tað kann fara at knípa við dómaraásetingum til dystirnar. Onnur deild endar sína kapping leygardagin, 4. oktober, og skal talan verða um fult leikumfar í teimum báðum fremstu deildunum hendan dagin, so fer tað uttan iva at standa á at fáa dómarar.

Dómaraásetingin fyri seinasta umfar skuldi viðgerðast fríggjadagin eftir evstamark okkara, men sum skilst, so verður arbeitt við ymsum loysnum fyri at fáa kabalina at ganga upp. Ein loysn, sum hevur verið umrødd, er at flyta onkran av dystunum í aðru deild til fríggjakvøld, um so er, at hesir ikki koma at hava avgerandi ávirkan á uppella niðurflyting. Í skrivandi løtu er einasti dysturin í so máta tann ímillum B36 og longu niðurflutta B68, men alt eftir úrslitunum nú leygardagin, og alt eftir úrslitinum av dómsnevndarviðgerðini av dystinum, AB-Sumba, so kann talan eisini gerast um aðrar dystir.

## Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 16 | 10 | - | 5 | - | 1 | 36 | 15 | 21 | 35 |
| 2 B36 | 16 | 11 | - | 1 | - | 4 | 34 | 17 | 17 | 34 |
| 3 B68 | 16 | 9 | - | 5 | - | 2 | 23 | 12 | 11 | 32 |
| 4 NSÍ | 16 | 8 | - | 4 | - | 4 | 29 | 16 | 13 | 28 |
| 5 KÍ | 16 | 7 | - | 2 | - | 7 | 25 | 25 | 0 | 23 |
| 6 EB/Streymur | 16 | 5 | - | 6 | - | 5 | 29 | 33 | -4 | 21 |
| 7 GÍ | 16 | 5 | - | 5 | - | 6 | 23 | 26 | -3 | 20 |
| 8 VB | 16 | 3 | - | 4 | - | 9 | 15 | 28 | -13 | 13 |
| 9 FS V | 16 | 3 | - | 2 | - | 11 | 22 | 39 | -17 | 11 |
| 10 Skála | 16 | 2 | - | 0 | - | 14 | 9 | 34 | -25 | 6 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 16 | 12 | - | 3 | - | 1 | 36 | 13 | 23 | 39 |
| 2 TB | 16 | 10 | - | 2 | - | 4 | 46 | 22 | 24 | 32 |
| 3 Sumba | 16 | 9 | - | 4 | - | 3 | 32 | 13 | 19 | 31 |
| 4 AB | 16 | 6 | - | 5 | - | 5 | 27 | 21 | 6 | 23 |
| 5 KÍ | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 31 | 47 | -16 | 22 |
| 6 B36 | 16 | 6 | - | 3 | - | 7 | 27 | 21 | 6 | 21 |
| 7 VB | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 28 | 20 | 8 | 20 |
| 8 B71 | 16 | 5 | - | 2 | - | 9 | 24 | 22 | 2 | 17 |
| 9 LÍF | 16 | 5 | - | 1 | - | 10 | 21 | 44 | -23 | 16 |
| 10 B68 | 16 | 2 | - | 1 | - | 13 | 9 | 58 | -49 | 7 |



B68-GÍ:

# B68 hevur ikki vunnið í fjúrtan ár

**Hjá bæði B68 og GÍ eru lyklaspælarar burtur, tá ið B68 fer at royna at vinna fyrsta heimasigurin á GÍ síðani 1989**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*GÍ plagar at hava gott tak á B68, tá liðini hittast á Svangaskarði*

Um hagtølini verða nýtt sum metingar grundarlag, so eru útlitini einki serlig hjá B68, sum í morgin fer at taka ímóti GÍ. Í 1989 vann B68 1–0 á Svangaskarði ímóti GÍ. Málskjútti ta ferðina var Hans Mourits Foldbo, sum var lærari á Toftum og mundi fáa manga glósuna fyri sjálvmálið – hann var aftasti verjumaðurin hjá GÍ. Síðani tá hevur GÍ verið greitt omaná á Svangaskarði, har teir ikki hava tapt, meðan B68 hevur staðið seg betri í Gøtu, enn teir hava gjørt á heimavølli.

Sunnudagin spældi B68 í Gundadali sær av við møguleikan sjálvt at gera FM heitið av. Eftir sjey sigrar á rað taptu teir ímóti HB. Spurningurin er nú, hvussu vónbrotið fer at ávirka avrikið ímóti GÍ. Manningarligu fyritreytirnar hjá B68 kundu havt verið betri. Landsliðsmaðurin Fróði Benjaminsen er leikbannaður, og tað er Mannbjørn Nesá, sum varð skiftur inn í 2. hálvleiki sunnudagin, eisini. Øssur Hansen noyddist sunnudagin at fara av vøllinum, tá ið 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamal. Hann hevði trupulleikar bæði í knænum og lærkrikanum. Øssur hevur ikki vant í vikuni, og á Toftum verður tað mett rættuliga lítið sannlíkt, at hann verður við í morgin, og ivaleyst hevur hann spælt fyri seinastu ferð í ár.

Súni Fríði Johannesen var leikbannaður ímóti HB. Hann verður við aftur í morgin, og tað kann væl hugsast, at Øssur Jacobsen, sum tóktist væl upplagdur, tá ið hann varð settur inn ímóti HB, verður ímillum teir fyrstu ellivu ímóti GÍ. Eyðstein Skipanes var orsaka av sjúku ikki við ímóti HB. Hann er nú tøkur aftur.

**Súni uttanfyri**

Gøtumenn fingu mikukvøldið trý kærkomin stig í Vági. Talan var um annan sigurin á rað, eftir at tað annars hevur verið soltið.

Kostnaðurin fyri sigurin á Vágs eiði var tvey leikbann. Høgni Madsen, sum varð skiftur inn í 2. hálvleiki, eigur annað, og hitt er serliga meint. Tað eigur Súni Olsen, sum hevur verið stak væl upplagdur síðstu ferðirnar.

Í Vági vardi Mortan Joensen GÍ málið. Hallur Hansen var sjúkur, men hann er tøkur aftur. Pólverski málverjin, sum hevur verið í GÍ málinum størsta partin av kappingarárinum, fór til hús undan heimadystinum ímóti EB/Streymi.

KÍ-NSÍ:

# NSÍ hevur góð minni úr Klaksvík

**Bæði hjá KÍ og NSÍ stendur tað manningarliga væl til undan síðsta landskappingardystinum í Klaksvík í ár**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Síðsti landskappingardysturin í Klaksvík, áðrenn tað verður farið undir 100. árið hjá KÍ, verður í morgin. NSÍ kemur at vitja, og teir í Runavík hava søt minni um síðstu landskappingardystirnar ímóti KÍ. Fyrr í summar vunnu teir sannførandi 4–0 á heimavølli, og í síðsta umfarinum í fjør skoraðu teir í evstu løtu sigursmálið til 3–2 í Klaksvík. Harvið tóku teir silvurkrónurnar frá KÍ, sum stóð eftir við bronsuni.

Bæði KÍ og NSÍ fara at røkka lakari endastøðu í ár, enn teir gjørdu í fjør. NSÍ berjist fyri at røkka bronsukerkjunum, og KÍ skal fáa úrtøku í morgin og í síðsta umfarinum, tá ið HB í Gundadali er á skránni, um teir skulu enda omanfyri miðstrikuna.

Felags fyri bæði liðini er, at tey taptu í 16. umfarinum. Fyri NSÍ, sum misti øll stigini ímóti B36, var tað vónbrot at tapa aðru ferð á rað og harvið at missa FM møguleikan. Fyri KÍ mundi tað kennast ikki sørt eyðmýkjandi at lúta í Miðvági, har FS Vágar stríðist fyri lívinum í bestu deildini.

Í gjár bendi nógv á, at alt fólkið fer at verða tókt hjá báðum liðunum. Kári Hansen hjá NSÍ var sjúkur síðsta sunnudag, men hann er komin fyri seg aftur. Jónstein Petersen hevur havt onkran smávegis snudd, sum forðaði honum í at venja hóskvøldið, men í gjár roknaðu teir avgjørt við, at hann verður á liðnum í Klaksvík.

Hjá KÍ var Ovi Nysted leikbannaður í Miðvági. Hann verður við aftur í morgin. Símun Joensen var ikki við í Miðvági, tí hann var sjúkur. Hann hevur ikki vant so nógv í vikuni, men í Klaksvík roknaðu teir í gjár við, at hann verður førur fyri at spæla í morgin.

*Frøin var stór á Runavíkingum, eftir at teir á seinasta leikdegi í fjør høvdu tryggjað sær silvurmerkini í Klaksvík*



# Tølini tala

Skal metast eftir hagtølunum, so hevur GÍ einki at óttast, tá teir sunnudagin fara á Svangaskarð. Har hevur GÍ ikki tapt síðani 1989, og seinastu tíggju árini hava teir skotið ikki færri enn 32 landskappingarmál á útivølli móti B68. Eisini KÍ og HB hava so dyggiliga hagtølini í sínum parti, tá tey fara á vøllin sunnudagin, so í so máta er einki at ivast í, hvønn veg yvirvágin hellir.

Hinvegin so skulu dystirnir spælast kortini. Hagtøl hava so enn ikki havt avgerandi orðið í nøkrum dysti, og dagurin í gjár telur ikki við, tá dómararnir kring landið blása dystirnar í gongd.

Hjálagda talvan sýnir, hvussu tað hevur tornað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum í bestu mansdeildini seinastu tíggju árini.

**-jm**

| | '02 | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FSV-Skála | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| KÍ-NSÍ | 2-3 | 2-1 | 0-1 | 3-0 | 4-1 | 4-0 | - | 2-1 | 2-2 | - | 5-1-2 | 19-9 |
| B36-HB | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 1-3 | 1-1 | 2-1-7 | 9-19 |
| B68-GÍ | 1-1 | 2-2 | 3-7 | 2-5 | 0-1 | 1-4 | 0-3 | 1-1 | 0-7 | 0-1 | 0-3-7 | 10-32 |
| EB/S-VB | 0-1 | 1-3 | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-2 | 1-4 |